# Neyðætlanin hjá Sumba er sett í verk

*Sumba gav FS Vágar ferðaseðilin til aðru deild í hondina sunnudagin, og metta eftir botnuppgerðini í Sørvági, er ilt at ímynda sær, hvussu vágamenn skulu handa hann víðari*



*Sumbingar tykjast enn eina ferð at hava sett kós móti eini framhaldandi tilveru í bestu mansdeildini*

JÁKUP MØRK
HEIMILDARFRÁSØGN

**FS Vágar-Sumba 0-2 (0-2)**

Lagt var upp til tann heilt stóra botngysaran, tá sumbingar sunnudagin fóru til Sørvágs at dystast móti FS Vágum.

Uttan at skilja B71 burtur frá teimum liðum, sum stríðast fyri at sleppa undan niðurflyting, vóru tað fyrst og fremst hesi bæði Sumba og FS Vágar, sum fólk flest høvdu í tonkunum, tá tosið fall inn á beinleiðis niðurflytan.

Nógv høvdu í so máta sumbingar til favorittar at tapa hetta stríðið, men hinvegin, so hava sumbingar áður snýtt serfrøðingarnar, og soleiðis tykist tað aftur at skula ganga í ár.

**Kenna háttin**

Sumba hevur nevnliga, síðani teir komu aftur í bestu deildina í 1998, verið heitur favorittur til niðurflyting á hvørjum ári, men onkursvegna hava teir kortini staðið seg. Seinast tá teir við einum máli í evsta minuttir á Vágseiði bjargaðu enn eitt ár í deildini.

Tískil vita teir betur enn teir flestu, júst hvat skal til í so máta, og líkt er til, at teir aftur nú eru farnir í holt við afturvendandi bjargingarroyndina.

Til dystin sunnudagin høvdu teir styrkt seg við Dánjal Johan Joensen, sum annars er fluttur av landinum. Dánjal Johan kom við flúgvaranum, júst sum sumbingar komu vestur, og beint sum dysturin var liðugur, gekk leiðin aftur til Danmarkar.

Saman við roynda verjuskansanum, Marlon Kjærbo og Bergi Vinther, var hann partur av hjartanum av sumbiarverjuni framman fyri Fróða Mortensen, sum aftur var at síggja í sumbiarmálinum.

**Løgdu nógv fyri**

Sumbingar tóktust frá byrjan sera uppsettir upp á at vinna dystin, og so at siga allan fyrra hálvleik høvdu teir eitt støðugt trýst oman móti vágamálinum.

Tað gekk heldur ikki long tíð, áðrenn trýstið gav úrslit. Spasoje Biberdzic, ella Bibi, slapp ígjøgnum í vinstra borði, og tá bólturin varð lagdur innfyri, var Nebojsa Veljkovic, ella Baja sum teir rópa hann, fyrstur á bóltinum, og so var 1-0.

Hóast leiðslumálið, so hildu sumbingar ongantíð upp at við at trýsta, og hetta kastaði eisini fleiri heilt vandamiklar royndir av sær. Tá teir so løgdu seg á odda, var talan tó einamest um eitt flott einmansavrik frá Sasa Tomajek. Staddur nakað í vinstru skamt uttan fyri brotsteigin fekk Sasa fatur á bóltinum, og eftir at hava drigið eitt sindur, langaði hann bóltin í netið, uttan møguleika hjá Remi at verja fyri.

Beint fyri hálvleik kundi Hallur Dam Joensen sløkt alla vón hjá vágamonnum, men Remi bjargaði frágera væl, tá einsamalli sumbingurin royndi seg móti málinum.

**Tóku seg aftur**

Í seinna hálvleiki tóku sumbingar seg nakað væl aftur á vøllin, og lótu ístaðin mótstøðumenninar um at hava bóltin.

Heimaliðið slapp nú at leggja eitt hampuligt trýst oman móti sumbiarmálinum, men veruligar møguleikar komu teir so at siga ikki fram til. Sumbingar stóðu sera stinnir í verjupartinum, og fleiri ferðir høvdu teir eisini heilt góðar møguleikar at seta ígongd mótálop. Fleiri ferðir førdi hetta eisini yvirtalsstøður við sær, men heilt vandamiklir gjørdist teir tó ongantíð, tí sendingar teirra ikki vóru nóg neyvar.

Móti endanum av dystinum var hetta um at kosta teimum sigurin, men í einum føri eydnaðist Halli at verja fyri skoti á sjálvari málstrikuni, og tá vágamenn at enda komu fram við Fróða í málinum, var Marlon komin aftur at verja fyri, tá bólturin skuldi rullast seinasta pettið.

**Returbillett**

Nógv bendir á, at vágamenn eftir tapið standa við eini returbilett til aðru deild í hondini. Enn kann støðan sjálvsagt bjargast, men hetta krevur í øllum førum ein sigur, tá sandoyingar koma á vitjan í næstum.

Nýggju kappingarreglurnar viðføra nevnliga, at hóast ein javnleikur ber í sær, at vágamenn og sumbingar verða javnir í stigum, og hóast FS Vágar hevur betri málmun, so eru sumbingar betri í innanhýsis uppgerðum.

Harafturat kemur, at um vágamenn skulu gera sær vónir um at vinna á sandoyingum, so skal heilt annað spæl finnast fram. Sum er tykjast teir at vera fangaðir í vælkendu óndu ringrásini, soleiðis at menn tykjast fullkomuliga máttleysir, tá farið verður á vøllin.

Møguliga verður støðan betri, tá Tór-Ingar aftur verður klárur at spæla, men ein maður fær ikki gjørt nógv einsamallur. Tað skal eitt heilt lið til, og tað hava sumbingar lært.

**FS Vágar-Sumba 0-2 (0-2)**

0-1: Nebosja Veljkovic 11
0-2: Sasa Tomajek 34

**Dómari:** Niklas á Líðarenda (GÍ)

**FS Vágar:**
Remigius Mikocionis – Poul Kjartan Thomsen, Eyðfinn Fjalsbak, Zylvanius Zudis, Heðin Joensen – Hannus Olsen, Igoris Kirillovas, Ari Thomassen, Rimvydas Bakus – Birgir Joensen, John Johannesen

**Sumba:**
Fróði Mortensen – Dánjal Johan Joensen, Marlon Kjærbo, Bergur Vinther – Mortan úr Hørg, jan Poulsen, Hallur Dam Joensen, Sasa Tomajek, Spasojé Biberdzic, hans Jacob Thomsen – Nebojsa Veljkovic

# B36 nærkast heiðursmerkjum

***2. deild:** Við einum 4-1 sigri á ÍF á útivølli er B36 av álvara farið at nærkast einum heiðursmerki í 2. deild*



STEFAN Í SKORINI

Undan dystinum í Fuglafirði ímóti ÍF hevði B36 tapt heili fimm av teimum seks útidystunum higartil í ár. Tað var tí ikki líkt til, at B36 fór at gera nakrar skreytir, men hagtølini vístu seg ikki at verða eftirfarandi í hesum føri. Hóast ÍF legði seg framum, so vann B36 sannførandi 4-1, og nú eru heiðursmerkini av álvara í ljósmála. Hesin sigurin var kanska serliga týdningarmikil hjá havnarmonnum, sum nú bara eru eitt stig aftanfyri ÍF á triðja plássi.

Tað var annars ÍF, sum legði betur fyri, og Bárður á Lakjuni skeyt eisini heimaliðið framum. Rúni Petersen legði ein flatan bólt innfyri, sum eingin av verjuleikarunum fekk fatur á. Við handaru stong stóð Bárður á Lakjuni og skeyt í tað tóma málið.

Eftir hetta gekk javnt á, og eingin nevnisverdur møguleiki var. Beint fyri steðgin javnaði B36, tá Brynleif Hansen tveitti seg fram og beindi eitt flatt innlegg úr høgru í málið, og 1-1 var støðan, tá liðini fóru til hálvleiks.

Beint sum seinni hálvleikur var farin gongd, var Brynleif Hansen aftur uppá spæl. Hesuferð skallaði hann ein bólt niður til Niels Joensen, sum stóð púra fríur í málteiginum. Niels Joensen var eisini maðurin, sum gjørdi tað til 3-1, tá hann varð spældur púra fríur, og hann rak eisini málverjan av, og so var 3-1 til útiliðið.

Einki vildi bera til hjá ÍF, sum skuldi vinna henda dystin fyri at halda lív í vónunum um at endurvinna sætið í 1. deild beinanvegin. ÍF hevði ikki tað stóra at bjóða uppá, og heimaliðið megnaði ongantíð at leggja nakað stórt trýst á B36 verjuna, sum serliga í seinna hálvleiki vardi sera væl.

Seinasta málið í dystinum tók væl samanum avrikið hjá ÍF leygardagin. Hornaspark varð sent innfyri, og heilt inni í málteiginum kundi Bárður Olsen púra ótarnaður set fótin á bóltin. 4-1 til B36, og teir fáu fuglfirðingarnir, sum vórður savnaðir omanfyri vøllin, sóu vónina um 1. deildar fótbót hvørva sum døgg fyri sól.

Nú eru heili fimm stig upp til TB, og tað verður torført at fáa tvøråmenn aftur, nú bara fimm dystir eru eftir. Næsti dysturin verður avgerandi fyri lagnuna hjá ÍF. Tá gongur leiðin til Tvøroyrar, og tann dysturin skal vinnast, um nøkur vón skal verða fyri uppflyting, men tað verður torført at vinna, tí TB hevur vunnið fimm av teirra seks heimadystunum.

**ÍF-B36 1-4 (1-1)**
1-0: Bárður á Lakjuni
1-1: Brynleif Hansen
1-2: Niels Joensen
1-3: Niels Joensen
1-4: Bárður Olsen



# B71 tók B36 á bóli

*B71 fekk við sigrinum á B36 trý ógvuliga týdningarmikil stig í niðurflytingarstríðnum. B36 er hinvegin at finna í ongamannalandi eftir tapi*



*Fullkomuliga óvæntað fór B71 avstað við øllum stigunum í Gundadali. Sigurin kom væl við hjá gestunum, men í B36 verður restin av árinum eitt tómrúm at kalla*

JÁKUP MØRK
HEIMILDARFRÁSØGN

**B36-B71 2-4 (2-1)**

Undan dystinum millum árstalsfeløgini bæði vóru tað fá, sum roknaðu við, at B71 fekk gjørt nakað sum helst við B36 liðið, sum tóktist at hava funnið rætta stevið aftur.

B36 hevur annars havt ein niðurtúr av teimum heilt stóru í vár, men eftir seks stig í teimum báðum seinastu dystunum var líkt til, at skútan var vend. Vóru havnarmenninir fegnir um hesi seks stigini, vóru sandoyingar tað ikki minni. Hesi vóru nevnliga fingin til høldar móti sumbingum og vágamonnum, sum B71 kappast við í botninum, og vóru tí viðvirkandi til, at B71 framhaldandi var røttu megin niðurflytingarstrikuna, tá dysturin varð bríkslaður í gongd sunnudagin.

Sandoyingar vóru tó fullgreiðir um, at eitt tap móti B36 sendi teir niður um hesa striku, tí kappingarneytarnir báðir dystaðust í Sørvági um sama mundi.

Tá dysturin byrjaði, var tó líkt til, at sandoyingarnir ikki løgdu so nógv í tann mun, sum var millum liðini á stigatalvuni. Heldur royndu teir at spæla sítt spæl, uttan at hava óneyðuga virðing fyri gestunum.

Longu tíðliga í dystinum tóktist tað greitt, at talan undir ongum umstøðum fór at verða um ein málleysan dyst, og tá 10 minuttir vóru leiktir, eydnaðist heimaliðnum at leggja seg framum. Jens Kristian Hansen átti sín stóra lut í málinum, tá hann driblaði og bandaði seg niðan eftir sandoyarhálvuni, áðrenn hann at enda fann ein púra leysan Magna á Lakjuni, sum kundi leggja heimaliðið á odda.

**Brotsspark og ikki**

Eftir hetta leikaði framvegis javnt á, og í nøkrum førum varð talan eisini um sera spentar støður framman fyri báðum málunum. Millum annað átti Julian Florescu eitt øgiligt langskot, sum tók í tvørstongina.

B36 leikararnir hildu seg tó eiga brotsspark, tá Jákup á Borg varð feldur í brotsteiginum. Floytan hjá dómaranum tagdi tó, og ístaðin vórðu tað gestirnir, sum nakað seinni fingu brotsspark. Hetta hendi, tá Kristian Nielsen royndi at bróta ígjøgnum. Eli Hentze tók sær av royndini úr 11 metrum, og so var aftur javnt.

Møguleikar fullu framvegis til báðar partar, og áðrenn Mikkjal fekk javnað eftir trunkaspæl, høvdu einar tvær líknandi støður verið í B71 brotsteiginum, uttan at hetta kastaði nakað av sær.

B71 hevði møguleika at javna beint eftir nýggja leiðslumálið hjá heimaliðnum, men skotið frá Jógvani Jón Petersen tók í træverkið, áðrenn bólturin støkk útaftur.

B36 kundi sostatt fara til hálvleiks við eini eitt máls leiðslu, men tað gingu ikki meira enn seks minuttir eftir steðgin, so stóð aftur á jøvnum. Høgni Hansen fekk bóltin í vinstru síðu, og eftir at hava driblað eina løtu, var hann at enda komin heilt inn undir B36 málið, hagani hann sendi út frá til Kára Nielsen, sum sendi í tóma málið.

Javnleikur var als ikki nakað, sum teir á heimaliðnum vóru nøgdir um, men fortreytir teirra fyri einum sigri versnaðu nógv, tá Klæmint Matras varð rikin av vølli fyri at hava sparkað Michael Jørgensen niður, tá hesin dró framvið.

Líkt var tó til, at møguleikarnir aftur batnaðu, tá Jón Brekku varð rikin av vølli, fyri hevnisøku móti Jørgin Meitilberg. Hetta tóktist tó ikki at nerva gestirnar, og tíggju minuttir fyri leiklok fingu teir endiliga lagt seg á odda. Hetta hendi, tá Julian fekk bóltin á miðjum vølli. B36 verjan ivaðist, og tá eingin kom ímóti, dróg rumenin nakað fram eftir vøllinum, áðrenn hann langaði eitt flatt skot heilt úti við stólpan.

B36 tóktist nú at falla fullkomuliga í fátt, og umframt málið, sum Høgni Hansen skeyt, eftir at ein púra leysur Eli Hentze hevði rullað upp á tvørs, hevði B71 fleiri atsóknir, sum við eitt sindur av hepni kundu gjørt sigurin enn størri. Samanlagt tó ein sigur, sum sandoyingar kunnu vera væ nøgdir um, og sum B36 leikararnir sum so ikki kundu mótmæla.

**Hugsa frameftir**

Eftir dystin helt liðskiparin hjá B36, at avrikið hjá teimum sunnudagin ikki hevði uppiborið eina betri lagnu.

- Tað var eins og vit ikki orkaðu at spæla í allar 90 minuttirnar, men tað skal ikki vera nøkur umbering, tí tað er eisini ov vánaligt at tveita leiðsluna burtur tvær ferðir, helt hann um sjálvan dystin.

Um tað, sum eftir er av kappingarárinum, helt B36-skiparin, at tað nú ráddi um at hyggja frameftir:

- Nú hava vit einki at spæla fyri restina av árinum, og tí er kanska líka so gott, at onkrir av yngru leikarunum fáa meira spælitíð og harvið royndir, helt Jens Kristian, sum tó iðraði seg um mista møguleikan at fylgja við oddaliðunum.

Var Jens Kristian vónbrotin, kann tað sama ikki sigast um liðskiparan hjá sandoyingum, Eli Hentze.

Hann var hinvegin óguliga fegin um stigini, og vísti eisini á stóra sálarliga týdningin av júst hesum sigri:

- Vit vistu jú frammanundan, at eitt tap hevði koyrt okkum niður um strikuna, so sigurin var ómetaliga týdningarmikil hjá okkum, helt veteranurin. Hann helt eisini, at sigurin hjá teimum var uppiborin, tá alt varð lagt saman.

Um dystirnar, sum eftir eru at spæla, helt hann, at talan í ongum førum fór at gerast um lættar dystir, men at sigurin sunnudagin tó var komin sera væl við í roynd-unum at sleppa undan niðurflyting.

**B36-B71 2-4 (2-1)**

1-0: Magni á Lakjuni 10.
1-1: Eli Hentze (br.) 38.
2-1: Mikkjal Thomassen 44.
2-2: Kári Nielsen 51.
3-2: Julian Florescu 80.
4-2: Høgni Hansen 83.

**Dómari:** Jens Petur Brattalíð

**B36:**
Tróndur Vatnhamar – Fróði Clementsen, Darius Magdisauskas, Jens Kristian Hansen – Jan Guttesen, Klæmint Matras, Mikkjal Thomassen, Magni á Lakjuni – Jákup á Borg, Maciej Maryniak, Håkan Lundholm

**B71:**
Waldemar Nowicki – Bergleif Sólsker, Jón Brekku, Jógvan Jón Petersen, Bjrøn Thorsteinsson – Kári Nielsen, Julian Florescu, Kristian Nielsen – Michael Jørgensen, Høgni Hansen, Eli Hentze

# TB vann við tíggju monnum

*2. deild: TB hevur framvegis EB/Streym í stuttum tjóri, og um oddaliðið snávar, so eru tvøråmenn tilreiðar at taka av tilboðnum um oddasessin*




*Hóast teir í seinna hálvleiki vórðu skerdir niður í 10, so megnaði TB kortinin at vinna týdningarmiklu stigini móti HB* *Mynd: Jonhard Hammer*

STEFAN Í SKORINI

Tað gongur væl við málskjótingini, men hinvegin fara eisini nógv mál inn í skeiva endanum hjá TB, sum hevur skotið flest mál í 2. deild, meðan bara HB hevur eina vánaligari verju enn TB. Tað vóru eisini júst hesi bæði liðini, sum møttust í Gundadali leygardagin, og tað skuldi borga fyri einum málríkum og undirhaldandi dysti, og áskoðararnir fingu eisini nógv mál fyri pengarnar.

Hóast HB megnaði at javna heili tríggjar ferðir, fingu teir einki burturúr strevinum og máttu taka til takkar við enn einum tapi, sum teir eisini hava gjørt í teimum seinastu trimum dystunum. 2. deildar liðið hjá HB má nú taka sær um reiggj, um teir ikki skulu flyta niður, nú teir eru á triðniðasta plássi, og bara tvey stig eru niður til Royn á aftasta plássi.

Ungi spælarin hjá TB, Bárður Dimon, legði útiliðið framum og byrjaði harvið málveitsluna. Anfinn Gaard javnaði, tá hann hevði seinasta fótin á einum frísparki, sum varð lagt innfyri. Birgir Jørgensen legði útiliðið framum aftur fyri steðgin, og 2-1 var støðan við steðgin.

Tá dómarin hevði sett dystin í gongd aftur, fekk Magni Petersen tað reyða kortið frá svartklædda manninum. Magni varð vístur av vølli fyri eina takkling, har hann eisini meiddi sær armin illa. Vagnur Mohr Mortensen tók frísparkið, og hann sendi eitt vakurt skot á stongina og inn. Hóast TBararnir vóru í minniluta á vøllinum, so eydnaðist Einari Petersen enn einaferð at leggja útiliðið framum, men Jónsvein Bærendsen var skjótur at svara aftur fyri HB, tá hann fekk fatur á einum skoti frá Gunnari Mohr, sum fór á tvørstongina. Endin gjørdist spennandi, og dysturin kundi koppa báðar vegir.

Tað gjørdist Birgir Jørgensen, sum skoraði vinnandi málið, tá bara fá sekund vórðu eftir at spæla. Undan hesum hevði Gunnar Mohr brent ein stóran møguleika, og í álopinum aftaná gjørdi Birgir Jørgensen sigursmálið. Birgir er nú eisini toppskjútti í 2. deild saman við Jón Sigurði Gleðisheygg. TB megnaði at vinna henda avgerandi dystin, hóast teir máttu spæla við bara tíggju monnum næstan helmingin av seinna hálvleiki. TB hevði fleiri aðrar møguleikar, og tað var serliga Birgir Jørgensen, sum var sekur í at misnýta, men samanumtikið var TB betra liðið, kanska serliga tá hugsað verður um reyða kortið hjá Magna Petersen.

**HB-TB 3-4 (1-2)**
0-1: Bárður Dimon
1-1: Anfinn Gaard
1-2: Birgir Jørgensen
2-2: Vagnur Mohr Mortensen
2-3: Einar Petersen
3-3: Jónsvein Bærendsen
3-4: Birgir Jørgensen